# Hjálp til føroysk børn og ung á netinum

*- Vit hitta børnini og tey ungu har tey eru - nevniliga á netinum. Tey eru von at ferðast á netinum, og tey brúka tað nógv. Hetta er teirra amboð og her kenna tey seg heima, sigur Høgni Kragesteen, hann lesur sálarfrøði í Århus og arbeiðir við kjakráðgeving til børn og ung í frítíðini.*



**- Børn og ung kenna seg heima á netinum, og tí er hetta eitt gott stað at hitta tey, sigur Høgni Kragesteen, ið arbeiðir óløntur við ráðgeving til børn og ung á møtistaðnum cyberhus.dk. Hann hevur gjørt ein føroyskan part á donsku heimasíðuni, so føroysk børn og ung eisini kunnu nýta kjakráðgevingina**

BØRN OG UNG
*Marjun Dalsgaard*

Í Føroyum eru ikki nóg góð tilboð til føroysk børn og ung, ið hava brúk fyri at tosa um trupulleikar av ymiskum slag, heldur Høgni Kragesteen. Hann lesur sálarfrøði á fimta ári í Århus, og í frítíðini arbeiðir hann óløntur á møtistaðnum cyberhus.dk, ið er ein heimasíða, har børn og ung kunnu spyrja um ymiskt og kjakast í einarúmi við vaksin fakfólk um alt millum himmal og jørð. Hetta er sostatt ikki eitt opið kjakrúm, har óviðkomandi kunnu fáa samband við børnini. 25 fólk arbeiða á cyberhus.dk kjakráðgevingini. Umframt lesandi arbeiða millum annað námsfrøðingar, sálarfrøðinga og sosialráðgevar, og tey hava sostatt altíð onkran royndan at tosa við, um evnini, ið tey kjakast við tey ungu og børnini um.

Á cyberhus.dk kunnu børn og ung kjakast um alt møguligt, til dømis um tey hava mist onkran, um sjúka er í familjuni, ella um tey hava upplivað nakað, sum tey hava ilt við at tosa um.

Høgni hevur arbeitt á cyberhus.dk síðani í januar og sigur, at hann fekk beinanvegin hugskotið at gera eitt føroyskt kjakrúm, av tí at tað er alneyðugt at føroysk børn og ung eisini fáa eitt tílíkt tilboð. Hetta ikki minst tí føroyska samfelagið er so lítið og afturlatið, og tað er ringt at tosa um nógvar av teimum tonkum, sum tey ungu ganga við.

- Til dømis er seksualitetir ikki nakað tosað verður opið um á sama hátt sum í Danmark, og tað at vera samkyntur, verður av mongum sæð sum nakað skeivt, sigur Høgni Kragesteen. Tabuini eru mangar og møguleikarnir fáir. Alt hetta ger, at føroysk børn og ung kanska hava enn størri tørv á at tosa við onkran vaksnan um teirra tankar.

- Føroysk børn kunnu sjálvsagt eisini skriva til donsku ráðgevararnar, men eg trúgvi, at tað er lættari hjá teimum at venda sær til ein føroying, ikki bara orsakað av málinum, men tí tey vita, at tað er ein, ið kennir til umstøðurnar har heima og so framvegis, sigur Høgni Kragesteen.

### Lættari á netinum

Høgni heldur, at netið er ein sera góður møguleiki at røkka teimum ungu og børnum.

- Vit hitta børnini og tey ungu har tey eru - nevniliga á netinum. Tey eru von at ferðast á netinum, og tey brúka tað nógv. Hetta er teirra amboð og her kenna tey seg heima. Hartil er tú vardur á ein annan hátt, enn tá tú ringir til eina ráðgeving, og hetta ger tað nógv lættari hjá teimum flestu at lata upp og siga sína hugsan, sigur Høgni. Tú kanst siga eitt sindur og fara aftur og so venda aftur, tá tú finnur dirvið. Hartil er tað møguligt at vera dulnevndur, eingin sær teg, og eingin hoyrir tína rødd.

Ofta hava tey ungu bara nakrar spurningar og royndir tey vilja deila við onkran, men tað eru eisini tey, ið hava størri trupulleikar, sum tey hava tørv á at tosa um. Kynsligur ágangur, rúsevnismisnýtsla og harðskapur eru millum tey evnir, sum børn og ung skriva til cyberhus.dk um, og tað er helst eisini fleiri, ið hava tílíkar trupulleikar í Føroyum, sigur Høgni. Men her kenna øll øll, og tað kann vera ringt at taka seg saman og fara at tosa við onkran um trupulleikarnar, sigur hann og leggur aftrat, at tað ikki er so bindandi á netinum.

- Ofta skamma tey seg yvir sínar trupulleikar og kunnu hava sera ringt við at tosa um teir. Tað kann vera ringt at hyggja inn í eygunu á einum øðrum persóni og greiða frá kynsligum ágangi, og tískil er netið eitt gott stað at byrja, sigur hann. Tá tað eru so álvarsamir trupulleikar, sum tey ungu skriva inn um, er hansara uppgáva fyrst av øllum at fáa samband við tey og vísa teimum víðari til onkran, sum kann hjálpa teimum.

Vansin við kjakinum er, at tú ikki sær børnini og tey ungu, sum tú kjakast við. Hvussu kedd tey eru, og hvussu tey hava tað, men Høgni heldur tó ikki, at hetta er nakar stórur trupulleiki.

- Tey brúka lagtekin (humørtekin), so sum smíltekin ella tekin, sum vísa ringt lag, ella tey skriva, nú smílist eg. Tað er heldur ikki ringt at merkja, um tú hevur veruliga kontakt, tí tú sær tað á mátanum, tey skriva uppá, eg gjørdist ovfarin yvir hvussu gott samband tú fært við tey á kjakinum, leggur Høgni aftrat.

Høgni er at hitta mikudagar millum klokkan 14 og 17 føroyska tíð. Føroysku ráðgevingina finnur tú á www.cyberhus.dk um tú klikkir á føroyakortið á myndini, sum kemur fram undir "menu" og "stuen".

## List í Runavík

**Listaframsýningin hjá Lions Club Eysturoy hevur nú 25 ár á baki í Runavíkar Skúla**

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Fyrsta og annan páskadag verður árliga listaframsýningin hjá Lions Club Eysturoy og er hon opin báðar dagarnar frá kl. 15 til kl. 20.

Hetta tiltak hevur staðið við síðani 1980, og er sostat blivin ein fastur partur av hátíðarhaldinum á staðnum.

Framsýningin verður sett fyrra páskadag kl 15 av Petur Martin Petersen, leiðara av Kunningarstovuni í Fuglafirði. Undir setanini fara Arni Carlsen og Kári Sverrison at framføra tonleik, og skal Kári syngja. Hann setur altíð ein serligan dám á har hann luttekur, við sínum serliga spæli og sangi.

Hesi 25 árini framsýningin hevur verið, er ein hópur av listaverkum framsýnd. Luttøkan hevur ligið millum 30 og 50 listafólk við 2 - 300 góðum og fjølbroyttum listaverkum.

Framsýningin hevur rúmað málningum, tekningum, akvarellum og klippum, og hevur gjøgnum árini verið sera fjølbroytt. Saman við royndum og drivnum listafólkum, hava ung og óroynd fólk her haft møguleikar at royna síni listarligu evnir og sýna tey alment fram. Her hava fleiri gjøgnum árini haft sínar fyrstu royndir, fyri síðani at menna seg og við tíðini eru blivin kend listafólk.

Allur ágóðin verður, eins og undanfarin ár, latin til vælgerandi endamál.